## DAGSINS MEINING

# Fyrisiting og fíggjarlóg

Ein fíggjarnevndarlimur setti sera áhugaverdar spurningar í tinginum herfyri. Hann setti spurnartekin við hví umsitingin er voksin so nógv undir sitandi samgongu. Vit hava fyrr á hesum stað víst á, at miðfyrsitingin er ongantíð vaksin so nógv, sum undir teimum báðum borgarligu løgmonnunum Edmund Joensen og Anfinn Kallsberg.

Einaferð hoyrdist, at fíggjarmálastýrið skuldi endurskoða bygnaðin. Tað skal sigast beinanvegin, at tað er positivt, at Finn Norman Christensen bygnaðurin verður endurskoðaður, tí ein bygnaður má tilpassast føroyska samfelagið. Ivasamt er, um eitt stýri í Finn Norman Christensen bygnaðinum skal endurskoða seg sjálvan - betur hevði verið við onkrum uttanfyristandandi, ið kanska eisini hugdi at starvssetanarpolitikki, meðal starvsaldur eftir lokið prógv og øðrum. Hetta skal ikki skiljast sum ábreiðslur móti tí fólki, ið starvast í miðfyrisitingini, men illa ber til at krevja av fólki, at tey skulu endurskoða seg sjálvan.

Tað ber ikki til at hava ein bygnað, ið man ikki hevur fólk nokk at fylla. Tað vildi verið stak óheppið, um fólk arbeiddu fleiri ár sum akademikarar í bygnaðinum uttan at hava fingið sítt prógv frá hægri læristovni, tí ikki var nóg mikið av fólki at taka av. Tað kann heldur ikki verða meiningin, at føroyska umsitingin skal enda líka yvirdimensionerað sum tann grønlendska, ið er stórinnflytari av donskum embætisfólki.

Umsitingin má tilpassast tørvin, ráðini og menniskjaliga tilfeingið. Tann stóra sentraliseringin, ið vit hava verið vitni til seinastu árini eftir Finn Norman Christensen uppskrift hevur gjørt, at miðfyristingin er bólgnað. Tá man nú alt for spakuliga byrjar at innsíggja, at ábyrgd má delegerast út aftur til stovnarnar hjá landinum, so verður tann í vavi styrkta miðfyrisitingin ikki minkað, sum man annars kundi væntað.

Tað er positivt, at politikarar fáa eyguni upp fyri hesum, tí margháttligt er at hoyra í hesum døgum, at landið ikki hevur ráð at varðveita fólkapensiónina, samstundis sum kostnaðurin av umsitingini er stórliga øktur.

Tað hongur ikki saman hjá samgonguni, við hennara ivasomu ætlanum um at útlisitera, privatisera og at tveita ábyrgdina fyri pensiónsviðurskiftum frá sær, samstundis sum umsitingin bara veksur. Tørvar okkum meiri fólk at umsita minni?

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Rættleiðing til Oddfríð Rasmussen

**Óli Holm,**
*landsstýrismaður*
*Tórshavn 10.10.2001*



Í samrøðu við Sosialin tann 10. oktober málber formaðurin fyri LISA, Oddfríður Rasmussen, seg á ein hátt, ið vísir, at hann tíverri hevur misskilt nakrar av teimum broytingum, ið eru gjørdar fíggjarlógaruppskotinum fyri 2002 í mun til fíggjarlógina 2001.

Við at lesa samrøðuna við Oddfríð Rasmussen kann ein fáa ta fatan, at stórar upphæddir eru skornar burtur av játtanini til mentan og list, og at hetta kemur at ganga út yvir listafólkini og eitt nú teirra starvslønir. Her er einhvør misskiljing, sum eg fegin við hesum vil rætta.

Tað er satt, at konti til listaøkið eru lækkaðar á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2002. Niðurskurðirnir, ið talan er um á eru á tveimum konti og eru lækkingarnar hesar:

Kontoin til framleiðslu av loftmiðlatilfari er lækkað úr einari millión í 2001 kr. niður í 700.000 kr. í 2002.

Síðan verður sagt, at ein konto uppá 3 milliónir til ávísar verkætlanir er skorin niður í helvt. Her má vera talan um eina misskiljing. Kontoin til mentanarligar verkætlanir (Ymiskir studningar) er lækkað úr 2 milliónum kr. niður í 1,7 mill. Kr. Hon hevur sostatt ongantíð verið 3 milliónir kr., og lækkingin er kr. 300.000.

Hesar eru tær konti til sjálvt listaøkið, ið eru lækkaðar. Hetta gevur eina lækking, ið svarar til 600.000 kr. Hetta er sjálvsagt harmiligt, men lækkingin kemur ikki at ganga út yvir starvslønir til listafólk, soleiðis sum formaðurin fyri LISA tykist at bera ótta fyri.

Tað er harmiligt, at vit vórðu noydd at lækka hesar játtanir í hesum umfari. Men samstundis ber til at staðfesta, at samlaða játtanin til mentan og list er munandi hækkað hesi árini síðan 1998. Sum dømi kann verða nevnt, at játtanin sum heild til mentan og list er hækkað úr góðum 46 milj. í 1998 upp í góðar 60 milj. kr. í uppskoti á komandi fíggjarlóg fyri 2002. Víst kann verða t.d. á Leikpall Føroya, sum í hesum valskeiði hevur fingið eina meirjáttan uppá 1,1 milj.. Mentanargrunnur Landsins, ið umsitur starvslønirnar, er hækkaður við eini meirjáttan uppá 1,3 mill. Herumframt eru aðrar hækkingar t.d. játtanin til mentanarligar verkætlanir, ið er hækkað úr 500.000 kr. upp í 1,7 mill. Kr.

Vit kunnu skjótt semjast um, at tað hevði verið ynskiligt at játtanin til list og listafólk var enn størri, enn hon er á verandi og komandi fíggjarlóg. Men upphæddin er tann, vit hava kunnað fingið politiska semju um undir verandi umstøðum. Hetta merkir sjálvandi ikki, at upphæddin er givin med alla og vónandi verður tað møguligt í framtíðini aftur at økja alla játtanina til list, listafólk og listarligt virksemi.

# Hvat trýr fíggjarmálaráðharrin at hann er?

**Ann Hovland**

At tveir búskaparfrøðingar í fimmaranum mikudagin í Útvarpi Føroya duga so vœl, sum teir gjørdu, skullu teir hava tøkk fyri báðir tveir. Men at hoyra ein óforskammaðan fíggjarmálaráðharra, hvørs rødd dirraði av øði, mundi falla bœði mœr og øðrum fyri brósti!

Hví sovorðið illsinni? Hví ferð eftir ferð bróta ein sakligan fyrrverandi landsstýrismann av? Hesin maður vildi upp á fyrispurning frá fíggjarmálaráðharranum svara spurninginum, men slapp ikki. Óforklárligt!

Vit sokallaðu sambandsfólk vóru í vár so smátt farin at trúgva upp á einar sjálvberandi Fœøroyar. Men so hendi nakað innan samgonguna. Fólk í Tinganesi skuldu hava pensión - nógva pensión. Skammið tykkum. Nœstan samstundis sum einastandandi vœlspœldur sjónleikur av Jóannes Nielsen var at síggja á Meiarínum, um hvat fer fram innan psykiatriina og Landssjúkrahúsið í síni heild.

Her mangla pengar!! Harra fíggjarmálaráðharri!!


**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## VIÐMERKINGAR

# Hvat kunnu vit fáa ístaðin fyri PÍKAR ???

**Petur Hermansen**



Nú tá íð lýsingarnar um at skifta til vetrar dekk, og harvið eisini píkar, aftur eru at sýggja og hoyra, kann eg ikki lata vera við at koma við eini áheitan um ikki at seta píkar undir bilin. Hendan áheitan er serliga til tey fáu, sum eru orsøkin til at alt einaferð enn skal flóta í runu og evju og at alt umhvørvið verður dálkað.

Tit, sum eru orsøkin til alla hesa dálking, eru sjálvandi sjónlig og síggjast, og fyri ikki at gloyma, HOYRAST, sum heglingsal. Vit eru nógv sum venda okkum, og spyrja: hví koyra fólk í 150 dagar við píkum á berum asfalti Hetta er fyri meg og nógv onnur ein GÁTA. Í dag eri eg glaður at eg ikki eri ein teirra.

Í hesi tíð, har tosa verður nógv um at nógv ansingarpláss mangla til øll hesi stakkals børn, og at langar bíðirøðir eru til hesi pláss , skuldi verið sjálvsagt at tað var gjørt nakað munagott sum at blaka Píkarnar, og brúkt hesar pengar til fleiri pláss til børnini.

Lat meg upplýsa, at bert í Havnini kundu vit fyri hesar pengar fingið ein nýggjan barnagarð um árið. Tað vil siga , at vit kundu spart einar 8 milliónir um árið bert við at blaka PÍKARNAR. Spurningurin er hvør vil tað ????

Eisini vil eg minna á, at umlei 300 gomul hava ikki sømiligar umstøður at liva síni síðstu ár , hettar er stór skomm fyri ØLL, serliga tey sum eru við til at oyðsla fyri allar hesar miliónir í runu og svansi, bert tí at tað kann gerast hált nakrar fáar dagar um árið. Tí fari eg at mæla til, at vit banna PÍKUM og harvið eru 70 milliónir tøkar til at bjarga BØRNINUM og teimum GOMLU. Hetta skuldi verið eitt ítøkiligt tiltak, sum kundi verið, serliga tykkum íð nýta píkar ein stoltleiki . Hvat so um tit skullu ganga einar tìggju ferðir um árið, so at børnini og tey gomlu kundu fingið pláss og sømilig kor í tì samfelag, sum tú og eg hava skapað????



Vónandi taka tit hettar at tykkum, og onki hevði tað gjørt um onkur politikkari hevði tikið hetta til eftirtektar.

Nú, fíggjarlógin er til viðgerðar, og allir flokkar royna at fáa fatur á so nógvum peningi sum gjørligt, er her ein møguleiki.

70 milliónir at spara, hvør vil ikki tað ??? ELLA HVØR TORIR!!

# Fyri felagsskapi ímóti fullveldi

**Finnleif Guttesen**



Sambandsflokkurin hevur eina greiða støðu viðvíkjandi samstarvi við Danmark og Grønland í ríkisfelagskapinum.

Tað eru vit, sum búgva í Føroyum íð hava fulla ábyrgd av hesum landi og eingin annar. At geva øðrum skuldina fyri gongdina í Føroyum, er ábyrgdarloysi við lít.

Er sjálvstýrismálið við at gera Føroyar til ein "danskan landslut"?

Gongdin í sjálvstýrismálinum hjá samgonguni, hevur verði sera vinglut hesi 3 1/2 árini og tað er ikki andstøðan ella Nyrup, sum kunnu taka sær heiðurin av hesum.

Verandi samgonga hevur eftir 3 1/2 árum enduliga funni útav, at heimastýrisskipanin kann brúkast í samráðingunum við Danmark og tað má alt Føroya fólk gleðast um. Men samstundis sigur samgongan, at ein skipan undir dansku grundlógini merkir at Føroyar gerast ein "danskur landslutur".

Mær vitandi so brúkar samgongan donsku grundlógina fyri at gera tað hon ger, so spurningurin er, um samgongan, sum nú viðurkennur heimastýrisskipanina, er við at gera okkum til ein "danskan landslut" so at vit missa okkara tjóðarrættindi og sjálvsavgerðarrætt, sum allir flokkar eru samdir um, at vit hava?

**Samgongan tvíheldur um, at alt verður betri við fullveldi**

Ein pástandur uttan hald í nøkrum sum helst, so hann hjálpi okkum, um hetta skal verða politiska mannagongdin í framtíðini.

Samgongan hevur í hesi 3 1/2 árini ikki við einum tí einasta veruligum dømi víst, hvussu vit fáa tað betri við fullveldinum.

Við kensluborðnum úttalilsum siga samgongu limir m.a.

- At ábyrgd skapar vælferð?
- Um rætt verður borið at, meira vælferð fyri minni pening.?
- At í Føroyum ferð altíð, at verða nóg nógv av peningi til eina nøktandi vælferð.?

Hetta eru orð frá einari samgongu sum lítið og einki hevur gjørt fyri vælferðini í 3_ ár, og sum reypar av metyvirskoti, bert tí vit hava fingið blokkin og sum við at skerja blokkin einki yvirskot hevur til komandi ár.

Omanfyri nevndu setningar er ein roynd at lumpa og lirka naka ígjøgnum, sum Palliba og Marsanna kanska kundu tikið undir við, men vónandi gera tey tað ikki, tí hetta er ábyrgdarleysur politikkur, sum einki hevur við veruleikan at gera.

**Sambands- og Javnaðarflokkurin fyri ríkisfelagsskapi**

Sum gongdin er ídag, er tað bert Sambands -og Javnaðarflokkurin, sum vilja gera broytingar til tað betra í viðurskiftinum millum Føroyar og Danmark.

Tá ið virksemi økist og inntøkurnar við, vil tað verða ein sjálvfylgja, at blokkurin minkast samsvarandi, men ikki fyrr.

Eingin kann tryggja nøkrum føroyingi nakað, tí eingin veit, hvat morgundagurin hevur at bjóða okkum.

Tí er politikkurin hjá samgonguni so vandamikil. Hann er verðuleikafjarður og hevur einki hald í gerandisdegnum hjá Palliba og Marsannu.

Um tað gongur væl ella illa, so er tað bert vit sum búgva her og teir politikarum sum vit hava valt á ting, sum hava ábyrgdina. At siga naka annað er uttanumtos og ein roynd at frásiga sær ábyrgd.

# Fólkaheilsan & vælveran?

**Hans Birgir Hansen**

Allir føroyingar kunnu vinna á heilsutrupulleikum, ið hava við drykkju-, mat- og nýtsluvørur við kemikalium, tilsetingum, litevnum, lívs, kost, nýtsluvanar, at gera í dag! Tað skal takast í rámasta álvara, at øll skulu gevast at keypa skaðiligar drykkir, mat og nýtsluvørur við kemikalium, tilsetingum, litevnir og broyta áðurnevndu vanar!

Øll reingerðar- og upploysingarevni skulu fyribeinast, frá køkinum til kjallaran, so familjan ikki andar inn hesi, ið seta gongd á skaðiligar bakteriur/virus! Tað kann sleppast undan deyðiligum sjúkum/fylgisjúkum, ið nógvir føroyingar stríðast við kring alt landið og í Hav, fylgja tit hesum ráðum, ein gevur tykkum!

Tað sama er við øllum heilivági, tit keypa við ella uttan resept frá kommunulæknum kring alt landið og í Havn, ið innihalda kemikalii/tilsetingarnevni/litevni!

Tað er reint drekkivatn/reina innandura luft/reinar drykki-/mat-/nýtsluvørur, øllum tørvar, og kropsligt arbeiði og dagliga motión á morgni/kvøldi!

Tað er nógv at spara av peningi og sjúkradagar, tá ið ein fær størri heilsubót og økta vælveru og kemur at síggja gott út og kenna seg væl fyri.

Tað eru nógv ítróttarfólk í somu støðu, so hví ikki gevast at smakka sær á og roykja og keypa sær skaðiligt góðgæti í kioskum/matvøruhandlum. Tað sama er galdandi, tá øll keypa burgarar/chips/pylsur úti í grillbarrum/kaffi/pylsuvognum/kioskum/matstovum kring alt landið og í Havn!

Tað er ein hópur av hjúnum og einstøkum, ið eru byrjað at fylgja eins ráðum at spáka ella smárenna tíðliga á morgni/kvøldið í havnargøtum! So hví ikki fáa dovnu, forkelaðu letingarnar heima við hús, kring alt landið og í Havn, sett í gongd!